# Rósa Samuelsen á norðurlendskum ráðharrafundi

Í vikuni var landsstýriskvinnan í almannamálum í Íslandi á norðurlendskum ráðharrafundi í Íslandi. Til umrøðu vóru tær stóru avbjóðingar, sum norðurlendsku vælferðarsamfeløgini standa fyri nú fíggjarkreppa hasar kring heimin, eitt nú í sambandi við alheimsgerð, fíggjarkreppu og økta arbeiðsloysið. Í yvirlýsing verður sagt, at neyðugt er at økja um samstarvið landanna millum fyri at lofta hesum avbjóðingum. Nýggi Norðurlendski Vælferðardepilin verður sentralur í økta samstarvinum. Depilin skal eitt nú klekja nýggjar hættir fyri at fáa arbeiðsleys og fólk, sum hava verið sjúkrameldað í longri tíðarskeið, út á arbeiðsmarknaðin aftur.



# MÆÆÆH við Múrin



*Við Múrin verður einasti festivalurin, sum fer at selja øl í plastikfløskum og vín í plastikgløsum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Á festivalinum í Kirkjubø fara tey at selja øl fyri tíggju krónur fløskuna á tjaldingarøkinum. Hinvegin sleppa festivalgestirnir ikki at taka øl ella tað, ið sterkari er, inn á festivaløki yvirhøvur**

SKEINKING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

»Tú kanst til dømis keypa ein heilan kassa av mæææh...« Lýsingin hevur koyrt seinastu tíðina á Rás2. Almenna loyndarmálið í hesi lýsing er, at mæææh merkir øl. Hesar eru altso til keyps á tjaldingarøkinum, tá festivalurin Við Múrin fer av bakkastokki 16. juli.

– Tað verður øl í plastikfløskum, sum verða til keyps á tjaldingarøkinum. Har verður ein básur, sum selur øl fyri tíggju krónu fløskuna, sigur Bjarni Kyster, ið rekur Bowlinghøllina á Hálsi, sum stendur fyri mati og drekka, ið verður selt Við Múrin.

Hann sigur, at teir einans ynskja at hava skipaði viðurskifti á tjaldingarøkinum og á festivalinum sum heild, og at tey tí gera hetta.

### Vín fyri fyrstu ferð

At ølfløskurnar verða seldar fyri tíggju krónur fløskuna inni á tjaldingarøkinum merkir, at festivalgestirnir ikki sleppa at hava øl ella tað, ið sterkari er, við sær inn á festivaløki.

Bjarni Kyster ynskir eisini at gera greitt, at bíligu ølfløskurnar einans verða seldar inni á tjaldingarøkinum, og at tað ikki ber til at taka hesar fløskurnar út um tjaldingarøki.

– Á sjálvum festivaløkinum hava vit barrir, sum koma at selja øl og vín í plastikgløsum, sigur Bjarni Kyster.

At vín verður selt á einum føroyskum festivali, er ikki sætt áður. Ei heldur er søla av øl í plastikfløskum, so í so máta verður skeinkingin Við Múrin eitt nýbrot.

Bjartur Dalsgarð, formaður í Loyvisnevndini, sigur í stuttari viðmerking, at loyvini verða givin út frá teirri umsøkn, sum fyriliggur og út frá tí leistinum, tiltøk verða skipað eftir.

### Fyrireikarar fegnast

Mark Joensen, ið er ein av fyriskiparunum av festivalinum í Kirkjubø, hevur ikki tær stóru viðmerkingar til skeingina Við Múrin.

– Vit hava latið sølu av mat og drekka upp í hendurnar á Bowlinghøllini og fegnast um, at tey taka sær av hasum og gera tað við skili, sigur Mark Joensen.

# Loyvisnevndin ger einki við tilboð

**Loyvisnevndin ger einki við ítøkiliga málið, tey hava viðgjørt, um at skeinkistøð kappast við at lata tilboð til gestir sínar**

LOYVI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Tað stendur einki í rúsdrekkalógini um, at skeinkistøð ikki kunnu lata avsláttur á rúsdrekka, og tí fyriliggur einki revsigrundarlag, sigur Bjartur Dalsgarð, formaður í Loyvisnevndini.

Men við skeinkiloyvinum fylgja eisini treytir um, at tú sum loyvishavari millum annað skalt vísa atlit til tað fráhaldsliga og tað sosiala, og eisini tá tað kemur til løgreglu eru ávís atlit.

– Um tilboðini so hava við sær, at nýtslan av rúsdrekka veksur, umframt at áðurnevndu atlit ikki verða yvirhildin, so ber til at fara inn við lóggávu og vísa á hvar farið verður út um mark, sigur Bjartur Dalsgarð.

Í málinum, Loyvisnevndin hevur viðgjørt seinastu tíðina, ber tó ikki til at fara inn vísa á ítøkilig punkt, har farið verður út um mark.

Sostatt fara vit helst framvegis at hoyra lýsingar við tilboðum um »fimm skot fyri einans...« ella »keyp eina kalda fyri einans«...

# Hini gera sum tey plaga

**Bæði G! og Summarfestivalurin siga, at tey fara at skeinkja sum tey hava gjørt seinastu árini. Skonkt verður á festivaløkinum, meðan festivalgestirnir sjálvir syrgja fyri sínum drykkjuvørum á tjaldingarøkinum**

SKEINKING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Teir báðir gomlu festivalarnir kenna seg ikki freistaðar at fylgja fótasporunum hjá nýggjasta føroyska festivalinum. Við Múrin fara tey at selja øl í plastikfløskum á tjaldingarøkinum fyri einans tíggju krónur fløskuna, men henda tátt ynskja tey ikki at taka upp á G! ella Summarfestivalinum.

### Góðar royndir

Katrin Petersen, verkætlanarleiðari hjá G!, sigur, at tey á ársins festivali gera eins og undanfarin ár. Á festivaløkinum fara tey at selja øl í plastikgløsum, meðan festivalgestirnir sjálvir gera av, hvat teir taka við inn á tjaldingarøki at drekka, so leingi hesin løgur er í glasfløskum.

– Vit ynskja ikki at taka frælsi frá fólki fullkomiliga, og tá vit hava serstakliga góðar royndir undanfarin ár, halda vit fram við hesum, sigur Katrin Petersen.

Ein av fyriskiparunum handan Summarfestivalin, Steintór Rasmussen, sigur eins og Katrin Petersen, at teir gera sum tey plaga í Klaksvík. – Vit halda okkum til tað, sum vit hava gjørt undanfarin ár. Soleiðis sær tað í øllum førum út í løtuni, sigur Steintór Rasmussen, ið leggur aftrat, at tey nokk skulu lata frætta, um tey finna upp á okkurt annað.

Tað merkir so eisini, at tey selja øl í plastikgløsum á festivaløkinum, meðan festivalgestirnir kunnu taka øl og annað við inn á tjaldingarøki, so leingi hetta er í plastikfløskum ella dósum.